

## Grønland fær næmingaheim fyri verkfrøðilesandi

Eitt næmingaheim fyri verkfrøðislesandi skal nú byggjast í Sisimiut. Hetta er greitt, eftir at tveir danskir grunnar (Villums Kann Rasmussen Fonden og A.vP. Møller og Hustru Chastine Mc-Kinney Møllers Fond til almene Formaal) hava játtað at læta 40 mió. kr til byggingina.

Tørvurin á einum næmingaheimi er íkomin, eftir at verkfrøðiútbúgvingar nú í nøkur ár hava verið í Sisimiut. Útbúgvingin er eitt samstarv millum kjarnuna fyri arktiska tøkni við DTU (Danmarks Tekniske Universitet) og tekniska skúlan í Sisimiut. Talan er um eina útbúgving, sum er skraddaraseymað til tørvin hjá teimum lesandi í Grønlandi. Higartil hevur tilgongdin av lesandi verið darvað av, at trupult var at finna hóskandi íbúðir. Men nýggja næmingaheimið við 42 íbúðum, loysir trupulleikan, tá tað ætlandi stendur liðugt í august 2008.

## Kópabreyð

Leygardagin kom eitt nýtt slag av rugbreyði í handlarnar í Tromsø. Hetta er eitt slag av fullkornsbreyði, men tað serliga við tí er, at bakarin hevur brúkt eina blanding av olivenolju og kópalýsi til breyðið. Tað eru tveir professarar, sum hava gjørt ta serligu blandingina, sum teir eisini hava fingið sær patent uppá. Teir eru á einum máli um, at breyð við kópalýsi er sera gott fyri fólk við hjartasjúkum og kann tálma hjartasjúkum.

# Triðja hvør fartelefon í ólagi

**Nokia, Motorola og Sony Ericson senda so nógvar fartelefonir á marknaðin, at tað gongur út yvir góðskuna, sum kemur í aðru røð**

FARTELEFONIR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

kup! eitur brúkararáðið hjá Ekstra Blaðnum. kup! ger kanningar av góðsku og prísum á vørum og tænastum, sum eru á marknaðinum í løtuni.

Í seinastu kanning síni hevur kup! spurt lesarar um royndir teirra við ikki færri enn 2512 fartelefonum. Niðurstøðan er greið. 768 av fartelefonunum hava verið í ólagi, innan fyri tey bæði fyrstu árini, klagurætturin er galdandi. Hetta merkir tað sama sum, at næstan triðja hvør fartelefon ikki riggar sum hon skal, áðrenn hon er tvey ára gomul.

### Oftast galið við Motorola

Kanningin vísti eisini, at í prosentum er tað oftast galið við Motorola. 41 prosent av 74 telefonum hjá teimum eru í ólagi. Hjá Sony Ericson hava 35 prosent verið í ólagi, men Nokia hevur trupulleikar við 27 prosentum av sínum fartelefonum.

### Ikki bilsin

Anette Højrup er løgfrøðingur í danska brúkararáðnum, og hjá henni koma tølini ikki dátt við.

– Hetta staðfestir bara tann illgrunan, sum vit leingi hava havt. Tey framleiða so nógvar fartelefonir, at tað gongur út yvir góðskuna. Ítøkiliga eru tað eisini fartelefonir, sum brúkararáðið fær flestar klagur um, sigur hon.

Annette Højrup heldur, at handlarnir eiga at vera skjótari at býta um fartelefonir, sum ikki rigga.

– Framleiðararnir hava sannført handlarnir um heldur at senda telefonirnar til umvælingar, í staðin fyri at býta tær um við eina nýggja telefon. Hetta er bíligari hjá teimum. Um handlarnir góvust við tí, vóru framleiðararnir eisini noyddir at gera meira burtur úr góðskuni, greiðir hon frá.




*Í Danmark er galið við 31 prosent av fartelefonunum, men í Føroyum sær trupulleikin ikki út til at vera eins stórur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Ikki borið til við buksum

John G. Pedersen eigur fleiri heimasíður um fartelefonir. Millum annað mobildebat. dk, og hann er skelkaður av úrslitunum í kanningini.

– Hetta hevði als ikki gingið um talan var um einar buksur, sigur John G. Pedersen, sum leingi hevur havt ein varuga av, at okkurt hevur verið galið hjá framleiðarunum, og at góðsku metingin ikki hevur verið nóg góð.

– Eg hoyri frá keldum í vinnuni, at telefonirnar ongantíð verða kannaðar av mannahondum, við einum sim-korti í. Og tá sigur tað seg sjálvt, at tað stendur illa til, sigur hann.

Torben Andersen er professari í telefonsamskifti við lærda háskúlan í Aalborg, og tølini koma ikki óvart á hann.

– Um eg bara varð spurdur, so vildi eg skotið uppá, at millum ein triðingur og helvtin av øllum fartelefonum høvdu brek. Trupulleikin er tann, at framleiðararnir senda telefonirnar á marknaðin, áðrenn ritbúnaðurin (t.e. software, blðm.) er liðugur og góðskumettur. Kappingin er so mikið hørð, at tey óttast fyri, at kappingarneytin kemur áðrenn tey á marknaðin, sigur hann.

### 620.000 brek

Sambært vinnufelagnum fyri brúkaraelektronik (BFE), vórðu tvær milliónir fartelefonir seldar í Danmark í fjør. Kanningin hjá kup! sigur, at 31 prosent av øllum fartelefonunum høvdu brek og tað svarar til, at bara í Danmark vórðu ikki færri enn 620.000 fartelefonir við breki sendar í handlarnar í 2005, sum kundar síðani keyptu og fingu trupulleikar av.

## Tíggjunda hvør telefon í ólagi hjá Føroya Tele

– Okkara royndir siga okkum, at tølini eru ikki so høg sum niðri, men vit merkja nakað til trupulleikan, sigur stjórin í FT-samskifti, Richard Mortensen, sum tað fyrsta, tá vit leggja tølini úr donsku kanningini fram fyri hann.

Tá vit so spyrja nærri til tølini hjá Føroya Tele, í mun telefonir sum hava verið í ólagi, vísir Richard Mortensen á seinasta árið hjá Føroya Tele, har talið av garantiumvælingum er góð átta prosent, í mun til talið av seldum fartelefonum.

– Tá skal so eisini sigast, at ein stórur partur, faktiskt tríggir fjórðingar, av garantiumvælingunum umfata software-uppdateringar, sigur hann.

– Tað sýnist sum um, at ritbúnaðurin á fartelefonunum ofta bert er gjørdur til tær mest vanligu funktiónirnar. Tá so brúkarin fer at nýta aðrar og meiri krevjandi funktiónir á telefonini, so er ofta at neyðugt er við dagføringum av ritbúnaðinum, greiðir stjórin í FT-samskifti frá.

Tá tølini hjá Føroya Tele av garantiumvælingum bert eru átta prosent eiga vit at hava í huga, at donsku tølini umfata eitt tíðarskeið upp á tvey ár, meðan tølini frá Føroya Tele bara breiða seg yvir eitt ár.

At dagføra ritbúnaðin á fartelefonini tekur ofta ikki meiri enn fimm minuttir og er tað eisini umfata av garantinum, so tað kostar onki so longi garantiið varar.

Richard Mortensen harmast tó um, at trupulleikar ofta eru við fartelefonunum.

– Tað er keðiligt haldi eg, men fartelefonin er í dag vorðin ein mótavøra, og tað gera framleiðararnir sær dælt av, vísir Richard Mortensen á, og sipar til ritbúnaðin, sum ikki altíð stendur mát við sjálva fartelefonina.

**-rwd**

## Tað er ein trupulleiki

Keypir tú eina telefon frá Kall og tú fært trupulleikar við henni innan fyri teir fyrstu átta dagarnar, so fært tú eina nýggja telefon. Við Nokia-telefonum er hetta galdandi í tvær vikur, men fært tú trupulleikar við telefonini eftir hetta, so verður hon tikin inn til umvælingar í meðan tú fært eina lánitelefon. Tað sigur Rógvi Róin, sølustjóri hjá Kall.

Kall kundi ikki útflýggja okkum tølini yvir telefonir, tey hava fingið og sum hava verið í ólagi, áðrenn evstamark okkara var, men Rógvi Róin ásannar, at tað er ein trupulleiki, at fartelefonirnar so ofta eru í ólagi.

– Tað er veruliga ein trupulleiki, tí tað skapar misnøgd hjá kundunum. Telefonir eru jú so dýrar, og eg haldi tað er ov vánaligt av veitarunum, at teir ikki kunnu koma við eini betri vøru, sigur sølustjórin á Kall, Rógvi Róin.

**-rwd**